


# 14 ára gomul koyrdi við kenning

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan tók um vikuskiftið trý fólk, sum koyrdu við kenning. Millum teirra var ein 14 ára gomul genta.

Hon hevði fingið fatur á lyklunum til bilin, ið hoyrdi til húsið. Hon hevði síðani sett seg við rórið og før at koyra runt í grannalagnum.

Hon var tó óansin og rendi í ein garð, og tá løgreglan kom á staðið, staðfesti hon, at gentan var ávirkað av alkoholi.

Hon varð tikin við á støðina, har barnaverndin var hjástødd undir avhoyringum. Ein frágreiðing varð skrivað, men gentan kann ikki revsast, tí hon ikki er fimtan ára gomul enn.

Løgreglan tók eisini tveir aðrar persónar, sum koyrdu við kenning um vikuskiftið. Blóðroynd er tikin, og hesir verða ákærdir eins og vanligt er.

Vikuskiftið hevur verið hampuliga friðarligt, men løgreglan hevur eisini tikið fleiri full fólk inn at sova rúsin av á støðini.

# Kriminaldeildin kannar eldsbruna

ELDUR
*Stefan í Skorini*

Sunnumorgunin klokkan fimm fekk brandstøðin fráboðan um ein eldsbruna í Kongagøtu í miðbýnum í Havn.

Nógv fólk var í býnum um hetta mundið, og onkur boðaði frá gjøgnum fartelefon, at eldur var í einum lítlum útbygningi á einum sethúsum.

Sløkkiliðið og løgreglan fóru á staðið, og tamarhald varð fingið á eldinum rættiliga skjótt, tí hann breiddi seg ikki til hin partin av húsunum.

Enn er eingin orsøk til eldin staðfest, og tí skal kriminaldeildin kanna málið nærri. Møguliga er stavar eldurin frá eini oljufýring, men hin møguleikin er, at hann er ásettur.






# Maður útideyður í Klaksvík

DEYÐSFALL
*Stefan í Skorini*

Leygarkvøldið klokkan seks varð ein maður funnin útideyður í Klaksvík. Maðurin varð funnin í bønum beint niðanfyri Stoksoyrarveg norðanfyri Norðborg. Maðurin var 60 ára gamal.

Maðurin er dottin omanav vegnum og hevur ligið í bønum, til hann varð funnin. Umleið ein metur er niðurav gongubreytini og niður á bøin. Maðurin hevur ligið fjaldur, tí hann lá tætt inn ímóti garðinum. Tískil hevur verið ringt at síggja hann frá vegnum, upplýsir sýslumaðurin í Norðoyggjum. Løgreglan leggur afturat, at maðurin var væl ílatin.

Løgreglan veit ikki, hvussu leingi maðurin hevur ligið, hvør deyðsorsøkin var, og hon kann heldur ikki siga nakað um, nær hann varð sæddur seinast.

Hon staðfestir bert, at maðurin varð deyður, tá fólk komu fram á hann.



*Her varð tann 60 ára gamli maðurin funnin útideyður. Hann er dottin niðurav gongubreytini og hevur ikki reist seg aftur. Fólk komu fram á deyða mannin leygarkvøldið klokkan seks*

Føroyskur bólkur í tónleikakapping:

# Makrel fekk gott úrslit í Íslandi

**Føroyski tónleikabólkurin Makrel gjørdist triðbesti bólkurin í stórari kapping í Íslandi. Rasmus Rasmussen varð harumframt kosin besti gittarleikari í kappingini. Ungu menninir í bólkinum høvdu als ikki væntað at fáa so gott úrslit**



*Rasmus Rasmussen varð kosin besti gittarleikari í stórari tónleikakapping í Íslandi. Bólkurin Makrel gjørdist triðbestur og vann 28 tímar í einum studio. Henda myndin er tikin undan Prix Føroyar finaluni í 1999*

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Føroyski bólkurin Makrel hevur rættiliga gjørt vart við seg í stórari tónleikakapping í Íslandi um vikuskiftið. Av teimum fjøruti luttakandi bólkunum var føroyski bólkurin kosin triðbestur.

Kappingin eitur Músíktilraunum, og hon er ætlað nýggjum bólkum, ið ikki hava fingið fótin fastan á tónleikapallinum. Henda kappingin er tað størsta tiltakið, sum tónleikabólkar í Íslandi gleða seg til á hvørjum ári, eins og Prix Føroyar er í Føroyum.

Limirnir í bólkinum eru Ári Rouch (sang), Hergeir Stakksberg (bass), Rólant av Reyni (gittar), Hans Erling Guttesen (trummur) og Rasmus Rasmussen (gittar). Hetta er at kalla sama manningin, sum var við í bólkinum Happy?.

Hetta er fyrstu ferð, at ein útlendskur bólkur tekur lut í kappingini, og íslendingar vóru fegnir um, at ein føroyskur bólkur hesuferð var við.

– Vit høvdu als ikki væntað, at tað fór at ganga so væl, og íslendingar tóku væl ímóti okkum, sigur Rasmus Rasmussen.

## Vunnu innleiðandi umfarið

Innleiðandi umfarið var hósdagin í seinastu viku, og Makrel vann hetta umfarið frammanfyri níggju aðrar bólkar. Síðani var finalan friggjadagin, og tíggju bólkar høvdu vunnið sær sæti í finaluni.

Tað vóru bæði dómarar og áhoyrarar, sum gjørdu av, hvør bólkur skuldi vinna kappingina, og har endaði føroyski bólkurin á triðja plássi. Makrel vann 28 tímar í einum studio í Íslandi.

Hesir tímarnir verða nýttir í einaferð seinni í ár. Fyrst kemur bólkurin aftur til Føroyar, har hann fer at venja tilfarið, sum skal spælast inn í studio.

Kappingin hevur verið umtalað í Morgunblaðnum og í íslendskum útvarpi, har føroyingarnir hava fingið góð ummæli, siga teir úr Íslandi. Brot úr kappingini verða send í íslendskum sjónvarpi í hesi vikuni.

## Rasmus heiðraður

Umframt at gerast nummar trý í kappingini varð Rasmus Rasmussen kosin besti gittarleikari í allari kappingini. Virðislønin var eitt gávukort frá einum tónleikahandli í Íslandi. Rasmus er kendur úr Diatribes, sum var við í finaluni í Prix Føroyum í 1999.

Rasmus Rasmussen sigur, at hann hoyrdi um hesa kappingina, tá hann gekk í skúla í Íslandi fyri nøkrum árum síðani, og nú fekk hann hugskotið at luttaka við føroyska bólkinum.

Bólkurin fekk stuðul úr grunninum Fitur, sum stuðlar norðurlendskum samstarvi, og frá Atlantic Airways.

# Dýrur taxa-túrur

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Nakrir íslendingar hava nýtt nógvan pening uppá hýruvognar um vikuskiftið. Sunnumorgunin skuldu triggir íslendingar úr Havn til Fuglafirðar við hýruvogni. Skip teirra lá við bryggju í Fuglafirði, og teir høvdu verið ein túr í Havn.

Tá teir koma til Fuglafirðar fara tveir teirra umborð, meðan tann triði ikki er førur fyri at koma úr bilinum. Hýruvognsførarin fær ikki mannin úr og má tí koyra aftur til Havnar við honum.

Hann verður síðani latin løgreglustøðini, har hann svav rúsin av sær. Sunnudagin koma hinir íslendingarnir aftur eftir manninum við hýruvogni, sum síðani koyrir teir aftur til Fuglafirðar. Íslendingar hava sostatt nýtt nakrar túsund krónur uppá hýruvognar, meðan teir hava verið í Føroyum.


## GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Sunny 1,6 Coupé**
hvítur, 3 hurðar,
árg. 1986, 305.000 km.
**8.000**

**Nissan Almera 1,6 SR**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1998, 44.000 km.
**109.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1997, 151.000 km.
**94.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel SR**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1999, 75.000 km.
**125.000**

**Nissan Primera 2,0 SLX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1998.
**135.000**

**Nissan Primera 2,0**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 121.000 km.
**47.000**

**Peugeot 306 XS 2,0 St.Car**
ljósa bláur, 5 hurðar,
árg. 1999.
**130.000**

**Peugeot 306 Diesel Aircon**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1999, 47.000 km.
**125.000**

**Peugeot 405 GTX 1,9**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1993, 30.000 km.
**59.000**

**Peugeot Expert 1,9 Diesel**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1995, 60.000 km.
**85.000**

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
**67.000**

**Opel Astra 1,7Dtl Wagon**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
**99.000**

**Opel Astra 1,7Dtl Wagon**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 42.000 km.
**105.000**

**Opel Astra 1,8 Club Wagon**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 104.000 km.
**70.000**

**Opel Astra 1,6 Club**
grønur, 4 hurðar,
árg. 2000.
**119.000**

**Opel Astra 2,0 Dti**
grønur, 3 hurðar,
árg. 1999, 40.000 km.
**130.000**

**Opel Astra 1,4**
bláur, 3 hurðar,
árg. 1997, 97.000 km.
**70.000**

**Opel Astra 1,7TD Wagon**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 99.000 km.
**65.000**

Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Lesið Sosialurin
-tað loysir seg